ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv
Óla Jákup Kristoffersen, adv
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Helga á Borg, adv.

Norðoyatunnilin P/f
Hoyvíksvegur 65
Postboks 1010
110 Tórshavn

TUNNIL
Komið
28 APR. 2017

Tórshavn 26.04.2017
J. nr. 20170203/HAB/msj
Skrivari: Margit Svabo Jørgensen
msj@jura.fo

**Viðv. ársaðalfundinum tann 24. mars 2017**

Vísandi til ársaðalfundin í felagnum, sum varð hildin tann 24. mars 2017, leggi eg við fundarfrágreiðing, undirskrivað av mær sum fundarstjóra, og sum skal heftast inn í fundarbók felagsins.

Somuleiðis er lagt við okkara avrokning.

Vinarlig heilsan

Helga á Borg, adv.
hab@jura.fo

# Fundarfrágreiðing

Ár 2017, tann 24. mars, varð ársaðalfundur hildin í P/f Norðoyatunnilin. Fundurin varð hildin á Hotel Hafnia og byrjaði kl. 11.30.

Fundarskráin sambært § 9 í viðtøkum felagsins:

1) Val av fundarstjóra
2) Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna ári, herundir eisini kunning samb. §18.
3) Framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning umframt ársfrágreiðing og góðkenning av ársroknskapi.
4) Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapin.
5) Val av nevndarlimum.
6) Val av grannskoðara.
7) Innkomin uppskot og ymiskt

**1.**
Fundarluttakarar:
Partaeigarin var umboðaður av Rúna Joensen, aðalstjóra í Samferðslumálaráðnum, og Niels Juel Arge, fulltrúa í Samferðslumálaráðnum. Allir nevndarlimirnir vóru á fundinum, Jens Kári Vilhelm, formaður, Heri M. Hammer, næstformaður og Jóhanna á Bergi. Frá felagnum møtti Uni Danielsen, stjóri og Reinold Isaksen, fíggjarleiðari. Grannskoðari felagsins, Símun Absalonsen frá Numo Sp/f møtti. Helga á Borg, adv. var eisini á fundi. Harumframt var nevndin í P/f Vágatunlinum, tó ikki Mathea Hilduberg, á fundinum. Uni Danielsen, stjóri greiddi frá, at feløgini vanliga eisini hava felags nevdarfundir.

Jens Kári Vilhelm, nevndarformaður bjóðaði vælkomin. Nevndarformaðurin skeyt upp, at velja Helgu á Borg, adv. til fundarstjóra, og hetta bleiv samtykt. Fundarstjórin staðfesti, at aðalfundurin var lógliga innkallaður og harvið lýstur at vera lógliga settur.

**2.**
Uni Danielsen, stjóri í felagnum, legði fram ársfrágreiðing og kunning sambært § 18 í viðtøkum felagsins, har hann vegna nevndina greiddi frá virki felagsins í farna ári.

Greitt varð m.a. frá, at vegna góða gjaldførið hjá felganum, hevði felagið plaserað yvirskotslikviditet á lánið til íleggingargrunnin, fyri harvið at spara rentur. Eftir avtalu við íleggingargrunnin hevði felagið nú ein trekningsrætt uppá 45 mió kr.

Greitt varð eisini frá ymiskum talvum og grafum við hagtølum, sum vórðu løgd fram, har tað m.a. framgekk, at ferðslan í tunlinum alsamt økist, eisini í mun til 2015. Samstundis eru alsamt fleiri, sum fáa sær hald, og tískil lækkaði miðalprísurin, sum hvørt akfar hevur goldið, eisini.

Felagið hevur lækkað prísirnar fyri hald, av tí at miðað er ímóti at hava sama prís at koyra gjørnum tunnilin sum í Vágatunlinum í 2017. Hóast eina príslækking hevði felagið ikki fall í umsetninginum í 2016. Tó væntast ein lækking í umsetninginum í 2017 grundað á príslækkingarnar.

Avskrivningarnar eru lækkaðar av tí at øll tann tekniska útgerðin nú er liðugt avskrivað eftir 10 ár.

Partaeigarin hevði onkrar spurningar til grafar og hagtøl, og stjórin og nevndin greiddu partaeigarunum frá sambært spurningunum.

Ársfrágreiðingin varð hereftir tikin til eftirtektar.

**3.**
Símun Absalonsen, grannskoðari, frá grannskoðaravirkinum Numo Sp/f legði fram ársroknskapin.

Grannskoðarin legði fram høvuðstølini í roknskapinum og greiddi m.a. frá eini hækkan í uttanhýsiskostnaðum, sum serliga stavaði frá tapi upp á debitorar. Talan var um eina upprudding av gomlum debitorum, sum nú vóru realiseraðir. Felagið hevði skift út innkrevjingartænastuveitara og nýtti nú advokat til hetta.

Nakað av útreiðslum til umvælingar hevur eisini verið í árinum, harímillum umvælingar av pumpum. Í hesum sambandi bleiv tosað um, hvussu slíkar útreiðslur skuldu takast við í roknskapinum, eisini í mun til skatt. Grannskoðarin vísti frá, at í hesum føri er tað eingin trupuleiki, at upphæddin er útreiðsluførd yvir raksturin.

Eisini varð greitt frá, at felagið hevði spart heilt nógv í rentu vegna undangjald í íleggingargrunnin.

Hereftir varð roknskapurin góðkendur.

**4.**
Avgjørt varð, at flyta fram ársavlop til næsta ár.

**5.**
Nevndin varð afturvald.

Jens Kári Vilhelm, takkaði vegna nevndina fyri álitið, ið víst varð við at afturvelja nevndina.

**6.**
Grannskoðari felagsins var afturvaldur. Grannskoðari er Sp/f Numo, Løggilt grannskoðaravirki.

**7.**
Eingi uppskot vóru innkomin.

Partaegiarin v/Niels Juel Arge, fulltrúa spurdi undir punktinum "ymiskt", um tað var ein møguleiki at arbeiða við at marknaðarføra haldini sum klippikort í staðin, so tað av heitinum týðiligari framgongur, at talan kann vera um eitt smidligt og óbindandi hald. Evnið varð síðani umrøtt, og Jóhanna á Bergi vísti á, at bert 7 % av allari ferðsluni eru staktúrar, men gav samstundis til kennar, hetta kundi takast upp í arbeiðinum framyvir.

Fundurin varð hereftir lokin.

Sum fundarstjóri:

Helga á Borg, adv.